Semja um markið nærkast alsamt

Enn vanta orðingar um allar liðir í eini loysn við Bretland um marknatrætuna. Men løgmaður er bjartskygdur og roknar við eini loysn, aðrenn langt um hiður.

INGI RASMUSSEN

Tað hevur ljóðað, at trætan um markið millum Føroyar og Bretland fór at finna eina loysn tíðliga í vár – 1. apríl hevur verið nevndur sum eitt mark hjá marknum.

Og líkt til, at føroyingar ikki verða lokkaðir apríl.

Nú vattar Anfinn Kallsberg, løgmaður, tíðindini um eina skjóta semju.

Í uttanlandsfrágreiðingini, sum løgmaður sambært tingskipanini skal láta eina ferð um ársins, sigur hann, at tað er «grund til at vona, at tað fer at eydnast at finna eina loysn á hesum torføra máli, aðrenn langt um líður».

Fiskimarkið við

Samráðingarnar við bretar hava snúð seg um landgrunsmark, greiðir løgmaður frá.

Men samstundis kemur avtalan millum londini eisini at fevna um fiskiveiðumarkið millum londini.

Síðan londini í 1977 fluttu fiskimarkið út á 200 fjarðingar, hevur fiskimarkið millum Føroya og Bretlands fylgt miðlinjuregluni, men vegna ósemju um grundlinjurnar, og hvørjar oyggjar bretsku megin miðlinjuna skulu roknast frá, hevur ikki verið semja um, hvussu miðlinjan millum Føroya og Bretlands skal verða roknað.

Sostatt hava verið havøki, sonevndu «gráu leiðirnar», sum báðir partar hava kannað sær.

Har hevur meira enn so hent seg, at skip, ið hava fiskað har við føroyskum loyvi hava verið ógrovað av íslendskum myndugleikum.

Ynski hevur verið um at loysa hetta trætumál.

Higartil hevur verið biðað við at greiða hesa fløkju, til tann fyri Føroyar nógv truplari og tvdningarmikla marknatrætan við Bretland er loyst, greiðir løgmaður frá.

Eftir at Danmark vegna Grønland í fjør samdist við Ísland og Noreg um markini millum Grønland, Ísland og Jan Mayen, er ósemjan við Føroyar eina ósloysta marknatrætan hjá Íslandi innanfyri 200 fjarðingar.

Verður semja við bretar um havmørkini innanfyri 200 fjarðingar, verður ósemjan við Ísland tann einasta, sum stendur eftir.

Tað kann tí roknast við, at hesin spurningur kemur til umræðu í ársins, sum nu er byrjað, sigur løgmaður.

Uttanfyri 200 fjarðingar stendur spurningurin um tey umskarandi krøvini hjá okkum, Íslandi, Bretlandi og Írlandi um landgrunn á Rockall Hatton leiðini framvegis óloystur.

Føroyar halda seg betur enn onnur strandalond megna at progva hjá altjoða samfelagnum, at landgrunnur Føroya rekkur út um 200 fjarðingar á hesum leiðum, sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður.

Gongd komin á

Gongdin í málinum í marknasamráðingunum hevur annars verið øjevn, dregur løgmaður saman í frágreiðingini til løgtingið.

Eftir stjórnarskiftið í Bretlandi í mai 1997 varð fundur millum samráðingarnevndirnar báðar í juli 1997.

Fundur var aftur í september 1997, men so kom steðgur í. Eftir landsstýrisskiftið í mai 1998 hava síðan í fjør summar verið óformligir fundir millum tann bretska og tann føroyska samráðingarleiðaran, sum er Arni Olavsson, har tær hava roynt at kanna møguleikarnar fyri eini samráðingarloysn, sum kann góðtakast av báðum partum.

Á nyggjarnum 1999 sær at so, at hesar óformligu samrøður fara at føra á mál, men enn eru ikki orðingar avtalaðar um allar liðir í eini loysn.

Og fyrr enn tað er greitt, er eingin loysn.

Kreppumiðstøðin heldur til í leigaðum hølum hjá KFUM í Havn

Kvinnuhús-felagið 10 ár

Í dag eru liðin 10 ár, síðani Kvinnuhusfelagið odnarveðursdagin 29. januar 1989 varð sett á stovn

Í mong ár hava kvinnur tosað um, hvussu nevðugt tað var at seta á stovn eina kreppumiðstøð til tær kvinnur, sum eru fyri harðskapi, - sálarligur sum kropsligum og/ella hottan um harðskap.

Tá tað frættist, at fráfarandi landsstýrið hevði játtað kr. 200.000 sambært figgarlógini 1989 til slík endamál, kom gongd á arbeiðið.

Ein áhugabólkur vendi sær til landsstýrið og boðaði frá, at ætlanir voru um at stovna eitt kvinnuhúsfelag.

Av ringasta veðri

Áhugabólkurin boðaði til stovnandi aðalfund í Mettustovu.

Vegna vánaliga veðrið vóru fleiri áheitanir um at utseta fundin. Hetta bar ikki til, tí sunnudagur var, og tá fundurin skuldi byrja kl. 2 henda seinnapartin, samstundis sum tíðindasendingin í útvarpinum byrjaði, vóru mong teirra, sum ætlaðu sær á fund, helst longu farin heimanfra.

- Nú var bert eftir at bíða, til klokkan varð 2, og vóna, at onkur fór at koma. Ilt var at meta um, hvussu nógvar komu. Kanska 10 ella 20, ella kundi tað hugsast, at Mettustova var ov lítil, sigur Kvinnuhusfelagið við Ebbu Parker Øre og Jane Hoydal í einum tíðindaskrivi.

Hølið fullsett

- Vit vóru ov farnar, tí ásettu klokkutíðina kom ein javnur streymur av kvinnum í øllum aldri og ymsa staðni frá. Til alla lukku rúmaðust øll 85 konufólkini í Mettustovu, hóast onkur matti standa uppi, stendur at lesa í tíðarritinum Kvinnutíðindi nr. 1-2, 1989.

Fundurin byrjaði, og allar kvinnurnar vóru sera ágrýtnar. Orðaskiftið gekk væl.

Uppskotið um viðtøkurnar vórðu samtyktar.

Endamalsgreinin hjá Kvinnuhusfelagnum hjóðar soleiðis:

Gerast skal arbeiði, sum miðar ímóti at styðja støðu kvinnuna og at styrkja sjálvskenslu og sjálvsábyrgd hennara, so hon í størri mun fær styrki at ráða og taka avgerðir yvir egna lívi sínum.

Virkihús vantar enn

Aðrenn fundur var lokin, vóru nevndir settar.

Fyri Kvinnuhusfelagið voru valdar: Jane Hoydal, Vilgerð Ástridardóttir, Petricia Christiansen, Birita Olsen og Winny í Pætursastovu. Karolina Petersen og Ása Olsen vóru valdar sum eykalimar.

Felagið fekk navnið Kvinnuhusfelagið, tí ætlanir vóru at stovna eitt fjølbroytt virkishús fyri kvinnur, har ein kreppumiðstøð eisini skuldi husast.

Enn hevur Kvinnuhusfelagið ikki havt orku til at seta á stovn virkishúsið fyri kvinnur, men Kreppumiðstøðin var sett á stovn árið eftir, 1. oktober 1990 í leigaðum hølum hjá KFUM, har hon heldur til enn.

Ymisk ráðgeving

Síðani januar 1991 hevur verið møguleiki at fáa ráðgeving av ávikavist gudfrøðingi, sálarfrøðingi, sosialráðgeva og løgfrøðingi, og síðani 1992 hevur verið bjóðað luttøku í sjálvhjálparbólkum við fjølbroyttum evnum.

Kvinnuhúsið er í dag eitt fróðskjól fyri kvinnur og børn teirra, ið eru fyri harðskapi, sálarligum sum kropsligum - og um hottan um hetta sama.

Somuleiðis er Kvinnuhúsið ein skái, har veitt verður hjálp til sjálvhjálp, endurbyggjan av mistum sjálvsáliti og stuðul til kvinnur við svarum lívinátta.

Kvinnuhusfelagið, sum rekur Kvinnuhusið, er grundað á sjálvboðið arbeiði.

Gestafyrilesarar

Lámatalið er í løtuni 122. Av hesum hava uml. 40 atikið sær tað neyðuga arbeiði fyri at reka Kvinnuhusið.

Øll, sum eru knýtt at Kvinnuhúsinum, hava tagnarskyldu.

Felagið hevur lítafund tríðja hvørt hósskvøld í hvørjum mánaði, har ymisk evni eru á skránni, sum hava samband við tað, sum hendir í samfelagnum innan áhugamál Kvinnuhusins.

Felagið hevur mest sum á hvørjum ári bjóðað einum útlendskum gestafyrilesara til Føroya at halda fyrilestur.

Seinasti gestafyrilesari var danska Tine Bryld, sum er kend bæði sum rithøvundur og sosialráðgevi. Hon helt eisini fyrilestur fyri almenningum, verður sagt í tíðindaskrivinum frá Kvinnuhúsfelagnum um virksemi felagsins, síðani tað var sett á stovn fyri 10 árum síðani.

Eru teir ov høgir rýkur útsúgvingarskipanin í tunlinum

– Tað kann kosta milliónir, um lastbilførarar fara ov høgir inn í tunnilin. Motorarnir, sum syrgja fyri allari luftutskiftingini, hanga nevniliga í somu hædd sum hæddarmerkingin, sigur Petur Eikholm, formaður hjá Landsverkfrøðinginum

ELI GUTTESEN

Líkt er til, at tunnilin millum Kaldbaksbotn og Kollafjørð gloypir meira, enn hann kann svølgja.

Í øllum førum skal tu ikki vera vísur í at sleppa heilskapaður igjøgnum, hóast tu ert sloppin nakað inn í tunnilin.

Orsøkin er, at tunnilin fer eftir ferð er útsettur fyri herverk, og eitt av herverksmálunum eru hæddarmerkingarnar við tunnilsmunnarnar.

Virðingin fyri hesi merking er nevniliga so sum so, og harafturat er líkt til, at fleiri lastbilførarar hava gloymt, hvat mest loyvda hæddin er.

Síðani koyrandi gjørdist – Orsøkin til, at eg sigi so er, at merkingin hongur í somu hædd sum øll luftútsúgvingin í tunnlinum. Er bilurin ov høgur til merkingina, er hann eisini ov høgur til alla útsúgvingarskipanina inni í tunnlinum.

– Munurin er bert tann, at merkingin gevur eftir, tá lastbilarnir bera við hana, men tað gera teir seks jetmotorarnir inni í tunnlinum ikki. Orsøkin er, at merkingin hongur í ketum, og meðan teir seks stóru motrorarnir eru boltaðir fastir.

Heldur hepni enn skil

Petur Eikholm, formaður hjá Landsverkfrøðinginum í Streymoyarøkinum sigur, at tað bara er hepni, at motrorarnir enn hanga uppi.

– Bilarnir hava verið so nær, at teir hava tikið í kontaktirnar undir motorunum. Vóru teir bara nokkar millimetrar hægri, hevdu teir eisini farið við motorunum, sigur hann.

Motorarnir hanga paraðir í trimum støðum inni í tunlinum og syrgja fyri luftutskiftingini úr tunnlinum. Virka teir ikki, fyllist tunnilin skjótt við bilosi, sum er vandamikið hjá fólki at anda í sig.

Milliónir upp í royk

– Skuldi tað hent, at ein lastbilur ella ein maskina fór avstað við øllum motorunum, høvdu vit helst verið neyddir at stongt tunnilin, til skaðin var umvaldur, sigur Petur Eikholm.

– Eg haldi tað hevði verið eitt ógiligt neistarok inni í tunnlinum, um nakað slíkt skuldi hent, tí bara elkáplarnir upp til motorarnar og ljósskipanina eru so tjukkir sum armar.

– Eitt er so tað, at tað tekur tíð at fáa fatur í nýggjum motorum, men slíkt gáloysni kann kosta dýrt, tí útsúgvingarskipannin kostar milliónir.

– Fyri at sleppast kann undan øllum hesum fari eg vegna landsverkfrøðingsstovnin at mæla til, at bilførarar virða hæddarmerkingina við munnarnar, ikki minst fyri teirra egnu skyld, sigur Petur Eikholm.

Arbeiða upp í saman

– Hetta er minst tiggjunda ferðin, vit eru úti fyri at skula umvæla hæddarmerkingina, síðani koyrandi gjørdist igjøgnum tunnilin. Hvørja ferðina kostar tað okkum nakrar túsund kronur. Fekk hetta frið, kundi peningurin og arbeiðsorkan verið betur brúktur aðrastaðni, sigur Peter Eikholm.

Eru bilarnir ov høgt lessaðir við loyvi frá løgreglumi, eiga teir tí ikki at nýta tunnilin, men í staðin fara eftir oyggjarvegnum.

Landsverkfrøðingurin fer í næstum at gera skeltingina við tunnilsmunnarnar enn tyðligari, so bilførarar siggja mest loyvdu mátini.

Hetta skuldi í øllum førum gjørt at bilørarar vistu størri ábyrgd.



- Tað er ikki bert hæddarmerkingin í tunnlinum, sum ikki fær frið. Í vikuskiftinum hava unglingar fyri at steðga inni í tunlinum og gera sig inn á lyktir og merkingar. Har henda stóð hava tiggju aðrar staðið undan hesari. Hinar eru avsnaraðar og stolnar, sigur Petur Eikholm, formaður hjá Landsverkfrøðinginum (Mynd: Kalmar)



Luftturbinurnar hanga í myrkri undir loftinum í tunnlinum og eru tí truplar at siggja. Snýtur tu teg undan hæddarmerkingini við tunnilsmunnan og heldur teg vera slopnan fer tu skeivur. Merkingin og turbinurnar eru nevniliga í somu hædd, nevniliga 4,60 cm frá vegnum. (Mynd: Kalmar)

Grundlógarkjak í væntu

Á tingfundinum í dag verður onnur viðgerð av uppskotinum hjá landsstyrinum um setan av eini grundlógarnevnd. Landsstýrið hevur longu samlað sær meiriluta fyri sínum uppskoti til løgtingslog, men tveir minnilutar halda ikki nógv um framferðarháttin, so kjakið verður óivað hart

LEIF LAADAL

Sum fimta mál á skránni á løgtingsfundinum, sum byrjar í dag klokkan 10, stendur onnur viðgerð av uppskotinum til løgtingslóg um grundlógarnevnd, ið landsstýrismaðurin, Høgna Hoydal, legði fram 1. desember í fjør.

Í høvuðsheitum skal hendan nevndin taka sær av at smíða eitt uppskot til eina føroyska grundlóg.

Tað sær ikki út til, at landsstýrið fær trupulleikar at fáa viðtikið løgtingslógina um eina grundlógarnevnd, men tveir minnilutar, umboðandi Javnaðarflokkin og Sambandsflokkin, taka ikki undir við uppskotinum.

Minnilutin, Hans Pauli Strøm frá Javnaðarflokkinum, viðmerkir, at mannagongdin hjá landsstýrinum er politisk rangvorg. Javnaðarflokkurin setur spurnaðartekin við, at landsstýrið vil byrja uppá eina føroyska grundlóg, aðrenn Føroya fólk yvirhevur er eftirspurt, um tað vil hava fullveldi, og aðrenn nakar hevur skil fyri, hvat hetta fulveldi er fyri nakað.

Javnaðarflokkurin vil heldur hava, at ein serstøk rættarskipanarnevnd verður sett at taka sær av teimum spurningum, sum hava við eina komandi føroyska grundlóg at gera. Hesum er to ikki meiriluti fyri í tinginum.

Alfred Olsen frá Sambandsflokkinum umboðar hin minnilutan. Hesin minnilutin tekur als ikki undir við uppskotinum hjá landsstýrinum. Alfred Olsen sigur millum annað, at Føroya fólk skal taka støðu til, um Føroyar skulu loysa sig úr ríkisfelagsskapinum, aðrenn ein tilik nevnd verður sett.

Minnilutin við Alfred Olsen sigur eisini, at landsstýrið villleiðir Føroya fólk við at siga, at fullveldisframferðarhátturin fer fram eftir eini skipaðari ætlan, har fremstu serfrøðingar í landinum sleppa at arbeiða við málinum. Hetta ger, at fólkið fær eina kenslu av, at alt er í góðum hondum.